# STÓRUR SAKNUR Í NORRØNU Í HETLANDI

**Andy Steven frá Promote Shetland ynskir, at bondini við grannalondini aftur verða styrkt. Hann ásannar, at tað ber neyvan til at koma uppá sama tal av fráferðum, sum fyrst í hesi øldini, men minni kann gera tað fyri hetlendingar**

Heri Simonsen

Millum hetlendingarnar, sum vitjaðu í Føroyum í samband við ein túr hjá Atlantic Airways farna vikuskiftið var Andy Steven, sum er marknaðarleiðari hjá Promote Shetland, hvørs endamál er at fáa fleiri ferðafólk til Hetland. Júst tann arbeiðssetningurin hjá Promote Shetland gjørdist munandi tyngri, tá Norrøna gavst at sigla til Lerwick. Andy Steven sigur, at tey sakna at síggja bilar við teimum serligu føroysku nummarskjøldrunum í Hetlandi. Tó er størsti saknurin, at tey mongu norsku ferðafólkini, sum tóku túrin úr Bergen til Hetlands, ikki hava møguleikan longur at koma við bili úr Noregi til Hetlands. Skotska flogfelagið, Logan Air flýgur tvær ferðir um vikuna millum Hetland og Bergen. Tann flogrutan gevur eitt rímiligt tal av norskum ferðafólkum, sum vitja í Hetlandi, men tað kann als ikki samanberast við tølini, sum vóru, tá Norrøna sigldi millum Lerwick og Bergen.

### Hava tørv á einari sjóleið

Andy Steven slær fast, at hetlendingar hava tørv á einari sjóleið, sum kann knýta teir við grannalondini. – Eftir okkara tykki, so gekk væl við rutini millum tey norðuratlantisku londini, men so broytist politikkurin á hesum økinum totalt. Tað almenna í Hetlandi setti pening í Smyril Line, fyri at felagið skuldi standa seg betur fíggjarliga. Men sjálvt, um vit í Hetlandi gjørdu hesa stóru íløguna, so eru vit hetlendingar slettis ikki við har sum avgerðirnar verða tiknar, greiðir ein hálvvónbrotin Andy Steven frá. – Eg kann bert vóna, at hugburðurin fer at broytast, og at vend fer at koma í.

### Skilja eisini hví

Spurdur um hetlendingar í síni heild eru vónbrotnir um, at Norrøna ikki leggur leiðina framvið longur, svarar Andy Steven: - Í tí stóra og heila, so eru hetlendingar vónbrotnir um hesa avgerðina. Andy Steven leggur tó herðslu á, at flestu hetlendingar skilja eisini avgerðina at gevast at sigla til Lerwick. – Tað var nógv kunning í teimum lokalu fjølmiðlunum, tá tað kom undan ljósi, at Smyril Line ætlaði at niðurleggja rutina. Flestu fólk skilja hví alt gekk galið, men samstundis dylist ikki, at talan er um eitt satt vónbrot fyri flestar hetlendingar.

### Eisini vónbrot í Føroyum

Og tað er ikki bara í Hetlandi, at fólk eru vónbrotin: - Á mínari ferð í Føroyum havi eg lagt merki til, at tað eisini eru fleiri føroyingar, sum eru harmir um, at farleiðin millum londini ikki er til longur. Eg dugi so ikki at meta, um hetta er støðan hjá øllum føroyingum. Meðan eg havi verið í Føroyum, er tað undrunarsamt hvussu nógvir føroyingar hava samskift við meg, og mínar starvsfelagar um hetta málið. Boðskapurin er greiður frá hesum føroyingunum, og tey eru heldur ikki fegin um, at hetta bandið við grannalandið er kvett. So kanska liggur ein møguleiki og bíðar, um hetta er kenslan í Føroyum, Spyr Andy Steven vónríkur? Andy Steven heldur, at um ikki annað, so átti tað at verið ein møguleiki at havt eina sjóleið á hásumri, tá møguleikarnir skuldu verið góðir at fingið fólk at ferðast til Hetlands og Føroya. Fyri Andy Steven snýr tað seg ikki um alt ella einki, men at fáa ein part av tí mista sambandinum aftur. – We miss seing our neighbours – vit sakna at síggja okkara grannar, slær marknaðarleiðarin hjá Promote Shetland fast.

*heri@sosialurin.fo*

